## DAGSINS MEINING

# Orðaskifti og lesarabrøv

So leingi Sosialurin og onnur føroysk bløð hava verið til hava hesi hýst lesarabrøvum og viðmerkingum frá lesarum. Hetta hevur verið og er ein týðandi partur av fólkaræðinum – rætturin til at siga sína hugsan um samfelagsmál og fáa hesa á prent.

Fyri nøkrum árum síðani gjørdu vit her á blaðnum av ikki at prenta lesarabrøv við dulnevni undir. Ymsar eru meiningarnar um hesa avgerð. Men vit hava so hildið og halda tað framvegis, at fólk, sum skriva lesarabrøv, eiga at seta sítt kristna navn undir. Tað hevur so eisini víst seg, at hóast hesa nýggju treyt, so fækka brøvini ikki. Tvørturímóti hava vit seinastu árini sæð, at fleiri og fleiri lesarar taka lut í orðaskiftinum. Tað hevur so heldur ikki verið nakar trupulleiki at sannføra fólk, sum av gomlum vana hava sent brøv við dulnevni undir, um kortini at seta sítt fulla navn undir, nú mannagongdin er broytt. So talan er eisini um eina tilvenjing.

Tað er okkara sannføring, at hetta var ein røtt avgerð. Og tí verður heldur ikki farið aftur til gamla siðin ella óskikkin at prenta dulnevnd lesarabrøv. At kappingarneytar framhaldandi gera tað er so teirra søk.

Lesarabrøvini, viðmerkingarnar og nú eisini nýggja forummið í blaðnum "Tinghellan" skulu vera við til at fylla út karmanar í demokratiinum: at hava eitt livandi og breitt orðaskifti. Hetta raðfesta vit høgt, men samtíðis mugu vit koma við einum hjartasuffi. Tað eru tey alinlongu lesarabrøvini. Hóast tað greitt verður tilskilað í blaðnum, at lesarabrøvini mugu ikki vera ov long, so fáa vit kortini lesarabrøv og viðmerkingar, sum fylla upp í eina ella tvær síður í blaðnum. Tað sigur seg sjálvt at koma fleiri slíkar viðmeringar um somu tíð, og tað gera tað oftani, so kemur proppur í. Vit hava rætt og slætt ikki rúmd nokk fyri at hýsa fleiri av hesum viðmerkingunum, sum fylla heilar síður og entá opnur. Tað er heldur ikki lesivinarligur lesnaðar, tá tað fyllur so nógv. Vit fáa eisini nógvar klagur, tá hesi longu innleggini koma í blaðið ferð eftir ferð.

Tí fara vit enn einaferð at gera vart við - og tað á hesum stað - at lesarabrøv og viðmerkingar skulu ikki fylla meira enn góð 4000 tekn fyri at koma við. Eru innleggini nógv longri koma tey antin seinni í blaðið, verða stytt ella koma als ikki í. Vil lesarin tí tryggja sær at fáa sínar viðmerkingar í blaðið beinanvegin má hann hugsa um longdina. Tað er so eisini okkara rættur og skylda at stytta long innlegg, men best er um sendarin sjálvur skrivar stutt og greitt.

Verða innsendu meiningarnar einans sendar til okkara, og eru tær av slíkum slag og at tær kunnu takast við í Tinghelluna ella sum kronikk í Vinnusíðunum, Bókasíðunum ol. serstøkum forum í blaðnum, so verður sjálvandi mett um tann møguleikan eisini. Tá eru krøvini til longd nakað ørvísi tó at tey heilt longu innleggini ikki fáa fyrsta prioritet.

Fyri at gera tað lættari fyri allar partar skulu vit hervið heita á tey mongu góðu fólk kring landið, sum ynskja at luttaka í almenna orðaskiftinum, um at gera hetta stutt. Tey, sum ikki klára at halda seg til hesar reglur, mugu so rokna við, at longu innleggini fáa seinni ella øðrvísi raðfesting. Við vón um framhaldandi gott orðaskifti.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Jamen Tobbi – du er da præst!

**Hans Jensen,**
*Hvalvík*

Vær ikke så mistrøstig. Har du glemt, at du tilhører et guddommeligt præstekollegie af ophøjede Mullaher? Har du glemt Lille Mesias sidder ved din højre hånd og dømmer levende og anderledes tænkende? Har du mistet troen? – så husk 48, da det færøske folk blev forrådt og korsfæstet af sine egne farisæerer.

Nei – fortvivl ikke. Jeg kan forsikre dig for at dine anakronistiske, politisk-religiøse mannakorn ikke falder på stengrund. Selvom du er diskret, tilbageholdende og uden de store armbevægelser, trænger dit glade budskab ud i enhver krog af det færøske samfund til trøst og vederkvægelse for de troende og til stille eftertanke for de tvivlende.

Det gode ved din forkyndelse er, at du ikke lader dig påvirke af trivielle ting som, at verden forandres, sæderne skifter o.s.v. Du er lige so tro mod dine principer, som andre er mod en 2000 år gammel beduinlov. Vi ved hvor vi har dig, din tro er ikke intelektuel, men emotionel – og sådan skal det være.

Vi var mange, der stemte på dig ved sidste valg i håb om, at du var manden, der kunne stoppe Høgni i hans ukontrolerede udskejelser med homoseksuelle og anden ukristelig dårskab. Høgni har nok troen – men det er en akademisk, universitetstrimmet tro, der ikke appelerer så meget til vore følelser som din spagfærdige, hjertegribende barnetro.

Men verden er uretfærdig. Du sår – Høgni høster.

Giv ikke op! For mange af os herude i mørket – er du lyset, der gør det daglige trælleliv under dansk imperialisme udholdeligt. Mens vi bøjer nakken under den nihalede kat og hører tommelskruerne knase vore knogler, fortrøstes vi ved tanken om livet efter dansken, og at du stadig er derude og kæmper for vores tro.

# Grundleggjandi skeivleikar og óræ ttvísi!

*Hans Birgir Hansen*



Tað er grundleggjandi skeivt og órættvíst frá almennari og politiskari síðu at raðfesta fakligu útbúgvingar frammarliga í tí rikna landspolitikkinum, ið ein alment vil mótmæla.

Tað er ein veruleiki at føroyingar við hægri fakligum útbúgvingum hava ongar praktiskar lívsroyndir/erfaringar við at hava sitið meginpartin av lívinum á reyvini heima.

Tað er ikki matari við teim lesandi í eru farin til Danmark og Norðurlond og Evropeisk lond til víðari lesnað í liva í dag av skattafría lestrarstuðli heima og danska SU.

Tað er ikki rættvíst skipað at tey sum venda heim aftur aftan á lokna hægri útbúgving og avlærd vera tikin fram um tey sum hava lokið útbúgving og avlærd í Føroyum.

Vit hava somuleiðis hópin av ófaklærdum/faklærdum ið lesandi hava lagt forðingar í vegin at sleppa út aftur á arbeiðsmarknaðir, almenna, privata í øllum Føroyum.

Tað er upp á tíðina at fáa skapt eitt rættvísari samfelagsbýti ímillum tey í eru í Føroyum og uttanlands ið vilja flyta heim aftur til Føroya, at taka við fakligu størvunum.

Tað er ein hópur av ófaklærdum/faklærdum ið tey komandi mongu árini fara at leggja niður størv, vegna aldur, í bygdum og býum í hvørjari kommunu í oyggjunum.

Tí er avgerandi neyðugt at fáa skapt eina javna tilgongd til mongu størvini skulu vit sleppa undan stagnatión, skal ikki alt fjøltátta virksemi, ikki steðga fullkomuliga upp.

Er tað fyrst steðga við kreppum og niðurgongstíðum, hvør skal so seta gongd á aftur virksemi, fer stórur partur av øllum ikki at klára at svara hvørjum sítt í fer at merkjast.

Hvør skal tá taka sær av øllum teim ið gerast gomul á bygd og bý, tað verður í hvørfall ikki føroyingar í útlegd í ikki hava slíkan áhuga bert í kt-vinnugransking-mentan.

Hvør skal fíggja fakligu útbúgvingar og avlærdu fæst ikki gongd á ali- fiskiútróðrarvinnuni í dag.

Sjálvur dámar mær ikki ellis- og røktarheim og búst ovnar har gomul og brekaði og menningartarnaði og onnur vera burturgoymd og á stovnum í hvørjari kommunu.

Eg haldi ikki at áðurnevndu hava uppiborið at fáa slíka viðferð og ikki kunna taka lut í samfelagslívinum í hava nógv at geva tí yngra ættarliðnum í hvørjari kommunu í dag.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.